**Fiskimálastýrið**
*Aðalskrivstovan*

# Fiskivinnuroyndir 2002

Játtanin til Fiskivinnuroyndir á løgtingssins fíggjarlóg er góðar 8 milliónir krónur. Í viðmerkingunum til játtanina verður sagt:

*"Fiskimálastýrið umsitur Fiskivinnuroyndir, sum verða fyriskipaðar í samstarvið millum Fiskirannsóknarstovuna, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Menningarstovuna. Vinnan luttekur eisini í hesum arbeiði. Játtanin er til fiskiroyndir og kanningar, herímillum vørumenning og hvussu sum mest fæst burtur úr øðrum fiskasløgum"*

Stýrisbólkur, sum fevnir um umboð úr nevndu stovnum og fólki úr fiskivinnuni, hevur gjørt eina stevnu fyri Fiksivinnuroyndir umframt umsóknarbløð, vegleiðingar og tilfar, sum greiðir frá ynskjunum og krøvunum til einhvørja verkætlan, áhugaði kunnu fara undir.

## Stevna

__Málsetningur__

Stevnan fyri fiskivinnuroyndum er at fremja royndir og kanningar - bæði vinnuligar og vísundaligar, ið kunnu verða við til at menna føroyska fiskivinnu, fiskiskap, fiskavirking og fiskasølu við atliti til burðardygga gagnnýtslu av okkara havtilfeingi og at trygd og nøgdsemi brúkarans verður sett í hásæti.

__Raðfest økir__

__1. Burðardyggur fiskiskapur.__
Hetta kann verða praktiskar royndir ella vísundaligar kanningar, sum hava til uppgávu:

- at gagnnýta fiskasløg, sum ikki verða gagnnýtt í dag.
- at menna skynsaman trolreiðslap, soleiðis at ávirkanin á botnin verður sum minst, at menna ristteknologiina og onnur selektiv inntriv.
- at menna línutøkni sum heild (línu, agn og egning, umframt brúka av KT í menningini)

__2. Gagnnýtsla av hjáframleiðslu:__
Hetta kann verða praktiskar royndir ella vísundaligar kanningar, sum hava til uppgávu:

- at økja um hjáframleiðslupartin, sum fer til matna og finna tekniskar loysnir fyri hesum
- at finna tekniskar loysnir uppá, hvussu garnarnar best kunnu koma til høldar,
- at finna loysnir í sambandi og sølu av gørnum til matna, men eisini til annað brúk

__3. Sjómatartrygd og nøgdsemi brúkarans__
Hetta kann verða praktiskar royndir ella vísundaligar kanningar, sum hava til uppgávu:

- at finna loysnir sum kunnu skjalfesta betri sporføri av vøruni og upplýsing til endaliga brúkaran.
- at finna loysnir fyri dálking og smittu umframt teir vegir hesi finna til matin. Herí eisini vísundaligar metingar av sannlíkindum og vandanum fyri dálkingini /smittuni.

__4. Virðisøking av upsatilfeinginum__
Hetta kann verða praktiskar royndir ella vísundaligar kanningar, sum kunnu hava við sær at virðið á upsatilfeinginum verður økt. Hetta kann verða:

- at finna nýggjar og betri hættir at virka upsan
- at finna nýggjar og betri sølumøguleikar

## Umsóknir:

Vinnuligar fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um pening úr fiskivinnuroyndum. Søkt verður á serligum umsóknarblaðið.

Umsóknir skulu verða Vinnuhúsinum í hendi innan hósdagin __24 januar 2002.__

Umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst frá Vinnuhúsinum. Tilfarið verður eisini lagt út á heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum __www.industry.fo__

Áhugað eru eisini vælkomin at venda sær til Ásmund Guðjónsson, samskipara við møguligum spurningum og øðrum.

**Ásmundur Guðjónsson, samskipari**
**Vinnuhúsið**
RC Effersøesgøta 30
100 Tórshavn
tel: 311864
faks: 317278
t-postur: __asmundur@industry.fo__

# Almennir fundir hjá Nes kommunu í 2002

Fundirnir eru kl. 19.00 í fundarhølinum hesar mánadagar:

| | |
|---|---|
| 04. februar | 02. september |
| 11. mars | 07. oktober |
| 22. apríl | 04. november |
| 27. mai | 02. desember |
| 24. juni | |

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

Fíggjarætlanin fyri 2002 liggur frammi á kommunuskrivstovuni í døgunum frá 14. til 28. januar 2002.

**Kommunuskrivstovan er stongd vegna summarfrí í: Viku 30, 31 og 32.**

**Nes kommuna**

# Verkstaðarassistentur

## til Varda Verkstaðin í Vági

Søkt verður eftir verkstaðarassistenti til Varda Verkstaðin í Vági at byrja 1. februar 2002 ella eftir nærri avtalu. Starvið er eitt fulltíðarstarv, sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki 11/17 plus viðbótur.

Verkstaðurin inni á Bakka er eitt vart verkstað við framleiðsludeildum. Uppgávurnar hjá starvsfólkunum eru at hjálpa brúkarunum og finna uppá uppgávur. Arbeiðsuppgávan hjá setta starvsfólkinum verður í fyrsta umfari at taka sær av træverkstaðnum og gera aðrar uppgávur í og uttanfyri verkstaðin. Verkstaðurin er normeraður til 15 brúkarar fulla tíð, og at fyriskipa arbeiði eru trý onnur starvsfólk sett.

Týdningur verður lagdur á at umsøkjarin:

- hevur handverksútbúgving ella líknandi handaliga útbúgving
- hevur vitan um og áhuga í at arbeiða við fólki við serligum tørvi
- er áhugaður í at útbúgva seg meira
- er kroppsliga væl fyri og ikki bangin fyri at taka tøk
- dugir at leggja arbeiðsuppgávur til rættis, eftir førimuni hjá brúkarunum
- dugir at samstarva
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 373536.

Skrivlig umsókn við prógvi, viðmælum v.m. skal vera okkum í hendi áðrenn 14. januar 2002.

**Vardi Verkstaðurin inni á Bakka**
**FO-900 Vágur**

www.sosialurin.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogur/hjálparfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi, 40 tímar um vikuna, ella eftir avtalu, til "Margarinfabrikkina - Virkishús fyri børn og ung".

__Margarinfabrikkin__
Margarinfabrikkin er eitt frítíðar- og virkishús fyri størri børn (8-12 ár) og ung (13-19 ár).

Opið er gerandisdagar frá kl. 13.00-17.30 fyri børn, og frá kl. 18.00-22.00 fyri ung.

Kvøldvaktirnar verða býttar soleiðis, at tað verða 1-2 kvøldvaktir um vikuna.

Margarinfabrikkin er framvegis í støðugari menning har roynt verður at fylgja við menningini og tí nýggja rákinum, ið rørist ímillum børn og ung. Samstundis verður roynt at geva teimum ábyrgd og samávirkan til virksemið í húsinum.

__Vit vænta__
at umsøkjarin:

- er áhugaður í at arbeiða við størri børnum og ungum,
- er opin, vísir ábyrgd og er positivur,
- hevur áhuga í skapanarevnum/er skapandi,
- er fyrikomandi og kann arbeiða sjálvstøðugt,
- vísir virðing fyri sínum medmenniskjum.

__Setanarviðurskifti__
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við Føroya pedagogfelag.

__Meira fæst at vita__
um starvið við at venda sær til Hendrik Andersen, tlf. 312217, ímillum kl. 13.00-18.00, ella Katrin Petersen, tlf. 31 51 60.

__Umsóknir__
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 14. januar 2002. Viðmerk á umsóknina "Pedagogur til Margarinfabrikkina".

SNARSKIVAN

# Haldórsvíkar Avhaldsfelag

hevur 75 ára stovningarveitslu tann 5. januar kl. 19.30 fyri limum við gesti. Kostnaður 150 kr. »Harmoniku Trio«.

**Nevndin**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Sløkkiliðsstjóri

Tórshavnar kommuna søkir eftir sløkkisliðsstjóra at byrja skjótast gjørligt.

**Starvið/ábyrgd**
Sløkkiliðsstjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni á brandstøðini og verkstaðnum.

Sløkkiliðsstjórin hevur tilvísing til tekniska stjóran og í sambandi við brunanevndina borgarstjóran, sum er formaður í nevndini.

**Høvuðsuppgávur**

- Umsitingarligur støðleiðari
- Lógarkravdur limur í brunanevndini
- Skrivari í brunanevndini
- Brunateknisk byggimálsviðgerð/umsjón
- Fíggjarliga ábyrgd
- Tilbúgvingarætlan
- Starvsfólkarøkt
- Útbúgving og venjing hjá sløkkiliðsmanningini
- Skipa fyri skeiðum
- Umboð býráðsins í bólkinum viðvíkjandi koyring fyri MBF

**Førleikakrøv**
Roknað verður við, at umsøkjarin hevur:

- førarabræv til akfar yvir 3.500 kg
- víðkað prógv í fyrstuhjálp
- heilsuváttan fyri sløkkiliðsfólk
- prógv frá sløkkistjóraskúla við nøktandi úrsliti sum brunaumsjónarmaður (brandinspektør). Hevur tú ikki prógvið, skal tað takast innan 2 ár
- nøktandi revsiváttan
- áræði, arbeiðssemi, góð samstarvsevnir og er fyrikomandi.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er starvsmannastarv og lønt í 35. lønarstigi í tænastumannasáttmálanum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 14. januar 2002. Viðmerk á umsóknina "Sløkkiliðsstjóri".

SNARSKIVAN

# Heimahjálparar/ heilsuhjálparar

Heimarøktin í Suðurstreymoy søkir eftir heimahjálpum/heilsuhjálparum at byrja skjótast gjørligt ella eftir avtalu. Løn sambært sáttmála við Fíggjarmálastýrið og Heilsuhjálparafelagið.

Umsóknin skal sendast til:

**Heimarøktin Suðurstreymoy**
att. Anna Maria Oskarsson, Økisleiðari
Skálatrøð 14,

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Kunngerð

Tórshavnar býráð hevur í 2002 regluligan fund hesar hósdagar, kl. 18.00:

31. januar
7. mars
4. apríl
2. mai
30. mai
20. juni
5. september
26. september
24. oktober
28. november
19. desember

**Tórshavnar býráð**

SNARSKIVAN

# Hagstova Føroya

Hagstovan sóknast eftir tveimum fólkum við útbúgving frá hægri lærustovni ella tilsvarandi førleika, til at arbeiða við búskaparhagtølum.

**Gjaldsjavnin** og stakpartarnir av honum: Rakstrarparturin við inn- og útflutningi av vørum og tænastum, rentugjaldingum, lønum o.ø. og kapitalparturin við broytingum í nettoskuld til útlond.

**Vinnugreinahagtøl** – serliga roknskaparhagtøl. Hetta eru stakroyndir av virkisroknskapum, sum eru grundarlag fyri uppgerðum av virðisøkingini í marknaðarliga virkseminum í landinum, skift á vinnugreinir.

Bæði arbeiðsøkini verða samskipað í tjóðarroknskapin, og kann tí roknast við heilt sjálvstøðugum arbeiði eins og samskipaðum arbeiði í verkætlanarbólkinum um tjóðarroknskapin.

Bæði starvsfólkini skulu seta seg føran fyri at læra at arbeiða við forriting úr datagrunni. Vit arbeiða við SQL forriting í sambandi við ORACLE datagrunn, sum tó ikki er ein treyt at duga frammanundan.

Bæði starvsfólkini skulu hava hollan kunnleika um samfelagsbúskap, hagfrøði, skráseting og dataviðgerð.

Løn verður latin eftir sáttmála millum avvarðandi fakfelag og Landsstýrið.

Umsóknarfreistin er **1. februar 2002**, og skal umsóknin sendast

**Hagstovu Føroya**
Postbox 2068
165 Argir.

Meira fæst at vita um størvini frá Hermanni Oskarssyni á Hagstovu Føroya, telefon 352800 og teldupostur __hermann@hagstova.fo__